**SEMJA**

Undirritaðu partar Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag hava d.d. gjørt soljóðandi semju við hjáløgdu skjølum, skjal 1 og skjal 2:

1. Settur verður arbeiðsbólkur at dagføra og endurskipa sáttmálabygnaðin, felags- og serreglur umframt semjur, ískoyti v.m., sum eru gjørd gjøgnum árini.

   Bólkurin verður mannaður við 2 umboðum fyri hvørt av manningarfeløgunum og 2 umboðum fyri Føroya Reiðarafelag. Miðast skal ímóti, at bólkurin skal vera liðugur við sítt arbeiði í sáttmálaskeiðnum.

2. Í felagsreglunum § 2, stk. 2 verður eftir 2. pkt. lagt afturat: "Er talan um avloysara, tilskilar skiparin hetta við ámynstring".

3. § 2 verður sett soljóðandi nýtt stk. 3: Eingin útmynstring verður úr føroyskari havn jólaaftan, jóladag og 2. jóladag".

4. § 8 í felagsreglunum verður orðað soljóðandi:

   "Skipari og manning skulu fáa arbeiðsklæðir umborð til innkeypsprís.
   ***Stk.2.*** Umborð á verksmiðjuskipum, har serlig arbeiðsklæði (kitlar og húgvur) verða kravd av heilsufrøðiliga eftirlitinum (Heilsufrøðiligu starvsstovuni), hevur reiðarin skyldu til at lata slík arbeiðsklæði ókeypis.
   ***Stk. 3.*** Dekkarar, sum hava siglt við sama skipi og/ella fast við skipum hjá sama reiðaríi í eitt ár ella meira, fáa, um teir í árinum hava verið helvtina av túrunum við skipinum og framvegis eru í tænastu, tá ið gjørt verður upp, eitt árligt endurgjald til arbeiðsklæðir á kr. 1.500,00. Endurgjaldið verður roknað fyri hvørt kalendaraár og kann gerast upp saman við seinastu avrokning í einum kalendaraári og/ella, tá ið túrur, sum gongur um ársskifti, verður gjørdur upp. Letur reiðaríið manningini arbeiðsklæðir, fellur endurgjaldið burtur.

5. § 10, stk. 5 í felagsreglunum verður orðað soljóðandi: "Lønin fyri hetta arbeiðið er tímalønin, ið er galdandi fyri handverkarar við styttri útbúgving (Sáttmálin millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverkarafelag) + frítíðarløn, tó kann akkord verða avtalað".

6. Í § 14, stk. 3 í felagsreglurnum (kokkurin) verða orðini " ... fáa kokkar kr. 50,00 pr. dag ..." broytt til "... fáa kokkar kr. 75,00 pr. dag ...".

7. Í § 17, stk. 2.1 (Línuskip til ísfisk) verður dagfrádrátturin fyri fiskireiðskap strikaður.

8. § 22, stk. 3 í felagsreglunum verður soljóðandi: "Um skip vegna óhapp ikki sleppur í vinnu sum ætlað, hava skipari og manning rætt til løn fyri inntøkutap, upp til 3 mánaðar minstuløn, galdandi frá og við 8. degi. Sama er galdandi fyri tann av partrolarunum, sum ikki sleppur í vinnu sum ætlað vegna óhappið hjá trolaranum, sum partrolað verður við".

9. § 22, stk. 10 í felagsreglunum verður soljóðandi: "Endurgjaldið fyri inntøkutapstrygging skal gjaldast teimum, sum veruliga hava mist inntøku vegna tann skaða, sum goldið verður fyri. Reiðarí/skipari gera uppskot um býti millum teirra, ið veruliga hava mist inntøku vegna skaðan. Uppskotið verður sent manningarfeløgunum til kunningar, og hava manningarfeløgini ikki meldað aftur innan 14 dagar, verður býtið at rokna sum góðtikið".

10. § 32 í felagsreglunum verður soljóðandi:

    "Tá ið annar parturin ger hin varugan við brot á sáttmála og/ella avtalur partanna millum, skal viðkomandi felag beinanvegin taka stig til at greiða málið.
    ***Stk. 2.*** Verður málið ikki greitt samsvarandi stk. 1, kann málið leggjast fyri Fasta Gerðarrætt, ið ger av allar trætur um røttu fatanina av sáttmálanum".

11. Í serreglunum § 38 (Trolarar á ísfiskaveiðu) verður býtisprosentið á 26,50% um manningartalið er 7 ella meira broytt til 27%. Talvan við býtisprosentinum fyri lækkandi manningartal verður rættað samsvarandi hesum.

12. Í serreglunum § 39 (Lemmatrolarar á ísfiskaveiðu) verður býtisprosentið á 26,00% um manningartalið er 10 ella meira broytt til 27%. Sama er galdandi fyri lemmatrolarar sum partrola, tó at støði verður tikið í 8 monnum. Talvurnar við býtisprosentinum fyri lækkandi manningartal verða rættaðar samsvarandi hesum.

13. Í serreglunum verður býtisprosentið í sáttmálanum fyri frystilínuskip broytt frá verandi 37% til 40%.

14. Partarnir eru samdir um, at henda semjan fær gildi frá 1. januar 2015.

    Viðvíkjandi túrum higartil í ár, ið eru gjørdir upp og avroknaðir, áðrenn reiðaríini vistu um broytt býtisprosent, t.e. eru punktini 6 (§14, stk. 3), 7 (§ 17, stk. 2.1), 11 og 12 (§§ 38 og 39), verður víst til Skjal 1.

15. Henda semjan og sáttmálin annars verður í gildi til hann av øðrum parti verður uppsagdur við í minsta lagi 2 mánaða ávaring til ein 1. apríl, fyrstu ferð 1. apríl 2017.

Tórshavn, 27. mai 2015

| | |
|---|---|
| Føroya Fiskimannafelag | Føroya Reiðarafelag |
| Jan Højgaard<br>Formaður | Herálvur Joensen<br>Stjóri |